## B36-dagur í Gundadali

Leygardagin skipar B36 fyri serligum B36-degi. Á skránni verða hópin av spølum og kappingum fyri børn í øllum aldri, og sjálvandi eru ymisk sløg av fótbólti eisini. Eitt nú dystur millum Vodafone-deildina og eitt Micro-lið, kapping í jonglering og FIFA-kapping á stórskíggja. Tiltøkini byrja klokkan 13 og halda fram til klokkan 17.


B36 familjudagur
á Tórsvølli og B36 Húsinum
leygardagin 13. juni 2009

Frá kl.13 til 17

- Skjóta uppá mál við holum
- Posarenning
- Togtogan
- Tombola
- Fiskidammur
- Dystur: Vodafondeildin ímóti micro B36arum
- Jongleringskapping
- Skjóta uppá mál hjá Tróndi Vatnhamar og Jóan Paula Jakobsen
- Human Bowling
- Street vøllur
- Grill
- FIFA kapping á stórskíggja
- Hoppiborg
- Tarvur

Um kvøldið

- kl. 20 Grill veitsla í B36 húsinum
- við uppboðssøla av málningi av Eyðun av Reyni - aftaná verður stórur dansur.

## Silkeborg-profilur til Belgia

Liðfelagin hjá Christian Lamhauge Holst, Steffan Ernemann, hevur víst stórspæl fyri Silkeborg, sum næsta ár skal spæla í donsku SAS-liguni. Men tað verður uttan hann, at felagið skal standa seg. Tað er nevnliga greitt, at Ernemann skiftir til Zolte Waragem í belgisku Jupiler League. Ernemann hevur spælt tvey kappingarár í Silkeborg.

# Kvinnurnar skifta spælistíl



*Nakrar av føroysku flogbóltskvinnunum, sum fyrst í Trongisvági og síðani á Giljanesi skulu spæla landsdystir ímóti Danmark. Frá vinstru Hervør Guttesen, Sólvá Dimon, Annika á Stongum og Karin Mikkelsen*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**Venjarin hjá føroysku flogbóltskvinnunum, Kristian Mikkelsen, væntar sær harða og sterka mótstøðu frá danska landsliðnum, men hann hevur tó vónir um at vinna eitt ella fleiri sett – og kanska meiri enn tað – tá liðini møtast tvær ferðir um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Mær vitandi, hevur einki sterkari kvinnulandslið nakrantíð vitja føroyskan flogbólt, so lítið er at ivast í, at vit fara at fáa harða og sterka mótstøðu. Danskarar eru í ferð við at byggja sær eitt nýtt landslið upp, og tað kann kanska vera okkara møguleiki, so vit kunnu fáa tvey góð úrslit.

Tað sigur Kristian Mikkelsen, sum saman við Jóhan Peturi á Stongum venur føroysku kvinnurnar, ið fyrireika seg til Oyggjaleikirnar á Álandi.

Hann hevur ikki sæð danska liðið spælt, men kortini hevur hann roynt at fyrireikað seg eitt sindur – millum annað við at sneytað seg fram til upplýsingar um teir ymsu spælararnar á danska liðnum.

– Hóast talan er um eitt gott lið, so hava úrslitini ikki verið so øgiliga góð hjá teimum í ár. Tær eru rættiliga ungar, og tað ljóðar, at satsað verður meiri uppá at fáa úrslit við hesum liðnum næsta ár, sigur Kristian, ið samstundis vísir á, at danska liðið er væl samanspælt, meðan tað føroyska spælir sín fyrsta dyst.

– Kortini havi eg vónir um at vinna eitt ella fleiri sett – og kanska meiri enn tað. Sjálvt um hetta eru tveir venjingardystir og vit fyrireika okkum til eina aðra kapping, ætla vit sjálvandi at spæla fyri at vinna. Spælararnir hjá okkum eru javnt góðir, so vit hava altíð gott fólk at seta inn, og væntandi sleppa allar hjá okkum at royna seg í hesum báðum dystunum.

### Skifta spælistíl

Av tí at tað ikki gekk eftir vild í finaluni á Oyggjaleikunum fyri tveimum árum síðani, tá Saaremaa mestsum sópaði føroysku kvinnurnar av vøllinum, hava venjararnir gjørt av at ganga aðrar leiðir, so liðið betur skal vera ført fyri at standa seg ímóti einum skot- og blokksterkum mótstøðuliði.

– Okkara spælarar eru ikki so øgiliga stórir, so tí hava vit valt at sett meira ferð á spælið, har miðjan skal royna at hála blokkin hjá mótstøðuliðnum sundur. Vit vilja hava miðjuna at fara báðar vegir og at fara eitt sindur burtur frá hevararnum, so tað verður verri hjá mótstøðuliðnum at rokna út, hvar blokkurin skal setast, sigur Kristian Joensen.

– Alt hetta ætla vit at royna í teimum báðum dystunum ímóti Danmark, sum óivað leggur okkum undir eitt so mikið stórt trýst, at vit kunnu fáa staðfest, hvussu tað hevur riggað hjá okkum at skift spælistíl.

Føroyska landsliðið er í morgin farið til Trongisvágs á venjingarlegu, og í dag kemur danska liðið til Føroya. Í morgin liggur leiðin hjá teimum til Suðuroyar, har fyrri dysturin verður spældur, og eftir hann fara bæði liðini norðuraftur. Sunnudagin spæla tey seinna dystin á Giljanesi, áðrenn donsku spælararnir fara avstað aftur.

# Besta upphiting nakrantíð

**Lítið er at ivast í, at kvinnulandsliðið í flogbólti fær sína bestu fyrireiking nakrantíð til einar oyggjaleikir, nú danska kvinnulandsliðið vitjar um vikuskiftið. Endamálið er at fyrireika føroysku kvinnurnar til sterka mótstøðu á Álandi**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað er ikki á hvørjum degi, at góð flogbóltslandslið vitja í Føroyum, men undantakið verður um vikuskiftið, tá Danmark sendir sínar bestu flogbóltskvinnur hendavegin at spæla tveir dystir ímóti føroyska kvinnulandsliðnum.

Og tað verður helst við líka stórum spenningi og intensiteti, sum vit kenna tað frá steypafinalunum, at Føroyar og Danmark fyrst spæla í ítróttarhøllini í Trongisvági í morgin klokkan 15, og síðani í ítróttarhøllini á Giljanesi sunnudagin klokkan 14.15.

Danska vitjanin undirstrikar, hvat føroyska kvinnulandsliðið ætlar sær á Oyggjaleikunum á Álandi um tvær vikur. Eftir fýra gullmerki á rað, setti Saaremaa ein stoppara fyri tí á Rhodos fyri tveimum árum síðani, tá føroysku kvinnurnar »bara« fingu silvur. Nú verður aftur farið eftir gullinum.

### Á hægri stigi

– Vit hava so ofta ætlað at fingið okkurt dygdargott lið hendavegin at spælt, og tá vit vendu okkum til danska kvinnulandsliðið, var leyst og liðugt beinanvegin. Tað eru vit øgiliga fegin um, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum.

– Vit fara sum oftast av landinum at fyrireika okkum, men at vit nú fáa eitt gott landslið hendavegin, er uppaftur betri. Og betri upphiting til Oyggjaleikirnar kundu vit ikki ynskt okkum, tí við hesum fáa okkara kvinnur óivað sterka mótstøðu og kunnu tí fáa nógv burturúr.

Danska kvinnulandsliðið spælir sínar EM-undankappingarnar í B-bólkinum, ein bólk oman fyri C-bólkin hjá Føroyum, so óivað verður talan um eina stóra avbjóðing hjá føroysku kvinnunum.